

Borgarstjórin í Stavanger, Christine Sagen Helgø,vitjar føroyska oljubásin á ONS messuni og fær myndabók og Mikkalina glaslunda í gávu. Her tekur Magni Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum ímóti, henni og varaborgarstjóranum.

# Borgarstjórin í Stavanger ynskti føroyingum góða olju-eydnu

Deil:

**Jan Müller**

27.08.2014 - 11:51

Oljan.fo

**Hóast Føroyar fylla lítið í teimum risastóru framsýningarhøllunum í norska oljuhøvuðsstaðnum Stavanger í hesum døgum, so eiga Føroyar kortini pláss millum tær túsundstals fyritøkurnar og londini, sum hava bás á altjóða oljummessuni ONS.**

Á føroyska básinum eru umleið 12 fyritøkur, kommunur og feløg, sum hava arbeiða í oljuvinnuni ella sum hava ynski um at hava eitthvørt tilknýti til oljuvinnuna.

Nú tøtt bond eru millum brøðratjóðirnar Norra og Føroyar var tað eisini náttúrligt fyri borgarstjóran í Stavanger, Christine Sagen Helgø, at vitja føroyska básin, har formaðurin í Oljuvinnufelagnum, Magni Arge tók ímóti forkunnugu gestunum.

Tey fingu eina skjóta kunning um, hvussu hevur gingist við leitingini við Føroyar, og sum enn ikki er vorðin nøkur sólskinssøga, men Magne Arge og borgarstjórin í Runavík Magnus Rasmussen greiddu eisini kvinnuliga norska borgarstjóranum frá tí sólskinssøgu, sum oljuvinnan í Føroyum er vorðin. Har tað í dag arbeiða meira enn 1000 fólki bæði í útlandinum og í Føroyum, og síðandi sá hon eisini stóru nýggju myndina av norska boripallinum West Hercules á Skálafjørðinum og varð kunnað um hesa stórhendingina í ungu føroysku oljuvinnusøguni.

Hon helt fyri, at hetta mundi vera eitt gjøgnumbrot fyri føroyska oljuvinnu og ynskti føroyingum góða eydnu víðari. Hon fegnaðist eisini um, at norskar fyritøkur við Statoil á odda kunnu vera við til at menna føroyska oljuvinnu og vónandi eisini finna føroysku oljuna.

Hon fór so heldur ikki tómhent av básinum. Við sær hevði hon avbera vøkru myndabókina hjá Ólavi Fredriksen, “150 Impressions of The Faroe Islands” og so ein lunda úr glasi frá Mikkalina Glas.







